

## Ronaldinho trívist

Brasilski stórspælarin Ronaldinho er við at koma í góða, gamla formin, sum gjørdi hann til ein av heimsins bestu fótbóltsspælarum. Um vikuskiftið skoraði Ronaldinho tvær ferðir ferðir, tá ið AC Milan vann heili 4-0 á Juventus. – Eg er sera glaður, tí liðið gevur mær møguleikan at avrika mítt besta, sigur Ronaldinho sambært TMW. Ronaldinho sigur, at stórtrívist undir venjaranum Leonardo, sum tók við leiðsluni í felagnum í fjørsummar.

# Skeið um ítrótt, venjing og skaðar



Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Um vikuskiftið verður skeið í ÍSF-húsinum í Havn. Byrjað verður fríggjakvøldið klokkan 18, tá hildið verður á í tríggjar tímar, og síðani verður hildið fram leygarmorgunin klokkan níggju til seinnapartin klokkan fimm.

Skeiðið er ein partur av venjaraútbúgvingini hjá danska ítróttasambandinum, DIF, og møguleiki er sostatt at byggja víðari uppá skeiðið. Undirvísari er Ulrik Balle.

Á skeiðinum, sum er fyri venjarar, hjálparfólk, leiðarar og ítróttarfólk, fæst vitan um, hvussu kroppurin virkar og hvat ein má taka hædd fyri í samband við venjing, og eisini fæst grundleggjandi vitan um venjing og fysiologi.

Somuleiðis verður fortalt, hvussu ein stórur partur av ítróttarskaðum kunnu fyribyrgjast og um týdningin av rættari upptrening, um skaðin er hendur. Luttakararnir læra eisini at gera eina rætta RICE-viðgerð.

Talan er sum heild um breiða vitan um venjing, upphiting, anatomi og fysiologi, venjingarprinsipp, undirvísingarprinsipp, ítróttarskaðar, trygd og ábyrgd. Eingin próvtøka er, men kravt verður at uppmøtingin er 100 prosent, og eftir lokið skeið fáa øll tey luttakandi luttøkubræv.

Skeiðið kostar 400 krónur, og tá eru frálærutilfar, matur og møgulig gisting í FSF-húsinum íroknað. Seinasta freist at melda til skeiðið, er mikudagin 6. januar. Tilmelding fer fram á ahl@isf.fo ella á tlf. 312606 ella 282331.

**hil**

## Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 121 (10) |
| Liljan Durhuus | VÍF | 89 (29) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 83 (13) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 71 (10) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 71 (11) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 69 (16) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 47 (3) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 45 |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 44 (10) |
| Una Egilsdóttir | VB | 44 (12) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 42 |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 42 |
| Lina Andriulyte | Neistin | 40 (1) |
| Bára Mortensen | VB | 38 |
| Bára Berthelsen | StÍF | 37 |

| Atlantic Airways-kappingin | | |
|---|---|---|
| Poul Kjartan Dam | H71 | 76 (15) |
| Sámal Joensen | VÍF | 74 (24) |
| Cristian Preda | StÍF | 73 (4) |
| David Edvardsen | Neistin | 73 (18) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 61 |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 59 (23) |
| Finnur Hansson | Neistin | 56 (11) |
| Ási Dam | KÍF | 56 (35) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 55 |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 51 (19) |
| Høgni Klein | Kyndil | 50 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 45 |
| Agnar Joensen | VÍF | 43 (4) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 42 (13) |
| Janus Sørensen | H71 | 40 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 345 | 245 | 100 | 21 |
| 2 Tjaldur | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 332 | 242 | 90 | 19 |
| 3 Neistin | 12 | 7 | - | 0 | - | 5 | 318 | 289 | 29 | 14 |
| 4 StÍF | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 289 | 354 | -65 | 8 |
| 5 VÍF | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 285 | 338 | -53 | 6 |
| 6 VB | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 226 | 327 | -101 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 353 | 296 | 57 | 18 |
| 2 VÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 328 | 314 | 14 | 10 |
| 3 StÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 298 | 310 | -12 | 10 |
| 4 Kyndil | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 273 | 296 | -23 | 10 |
| 5 H71 | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 282 | 294 | -12 | 9 |
| 6 KÍF | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 270 | 294 | -24 | 9 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 10 | 10 | - | 0 | 30 | 3 | 27 | 20 |
| 2 TB | 10 | 7 | - | 3 | 24 | 12 | 12 | 14 |
| 3 Mjølnir | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 16 | 6 | 12 |
| 4 Fleyr | 10 | 6 | - | 4 | 20 | 16 | 4 | 12 |
| 5 Dráttur | 11 | 5 | - | 6 | 20 | 19 | 1 | 10 |
| 6 ÍF | 11 | 2 | - | 9 | 6 | 28 | -22 | 4 |
| 7 KÍF | 10 | 0 | - | 10 | 2 | 30 | -28 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 11 | 9 | - | 2 | 29 | 11 | 18 | 11 |
| 2 SÍ | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 18 | 4 | 6 |
| 3 Fleyr | 11 | 5 | - | 6 | 25 | 22 | 3 | 6 |
| 4 ÍF | 10 | 0 | - | 10 | 2 | 27 | -25 | 0 |